# Barsilsskipanin

## Váttan sambært setanarviðurskifti sjófólksins (MLC), norm A.2.5.2, um Barsilsskipan

**Høvuðstreytir fyri at fáa rætt til barsilspening eru, at tú:**

1. Ert foreldur, ið fer frá arbeiði, orsakað av viðgongu ella barnsburði
2. Ert foreldur, sum fer frá arbeiði fyri at vera heima hjá ættleiddum barni
3. Hevur fastan bústað í Føroyum
4. Hevur fulla skattskyldu í Føroyum
5. Ert um barnið í barslinum
6. Hevur A-inntøku og/ella B-inntøku, ið trygging er teknað fyri, soleiðis at barsilspeningur kann roknast

**Trygging**

Løntakarar í FAS-skipanini, ið búgva í øðrum norðurlandi hava rætt til barsilspening, um trygging er teknað frammanundan.

Sjálvbodna tryggingin kann teknast um tú:

- hevur A-inntøku til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini, og
- er búsitandi í einum av hinum Norðurlondunum, og eftir norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd er fevndur av føroyskari lóggávu, ella
- er búsitandi í Danmark ella Grønlandi, og eftir danskari ella grønlendskari lóggávu ikki hevur rætt til barsillspening

Løntakarar við B-inntøku, hava rætt til barsilspening, um trygging er teknað frammanundan.

Sjálvbodna tryggingin kann teknast um tú:

- hevur fastan bústað í Føroyum
- hevur fulla skattskyldu í Føroyum, og
- hevur lønarinntøku, sum er B-inntøka

Tryggingin kann stovnast frá fyrsta starvsdegi.
Tryggingin fær gildið tann dagin umsóknin er móttikin.
Løntakarar hava rætt til barsilspening 1 ár eftir at tryggingin er stovna.

Tryggingin kostar 500 kr. árliga.
Fyrsta rokningin verður send við játtanarskrivinum tá umsóknin er gingin á møti.

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

**Tíðarskeið fyri barsilspening**
Mammur hava rætt til barsilspening 4 vikur áðrenn mettan barnsburð ella 8 vikur áðrenn mettan barnsburð, um hon prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð hava mammur rætt til barsilspening.

Eftir viku 14 hava foreldrini rætt til barsilspening í tilsamans 26 vikur innan fyrstu 44 vikurnar eftir barnsburð.

Foreldur, ið fáa fleiri børn undir sama barnsburði, hava rætt til 4 vikur afturat samlaða tíðarskeiðinum hjá foreldrunum. Vikurnar skulu takast innan 48 vikur eftir barnsburð.

Foreldur, ið fáa barn áðrenn 8 vikur áðrenn mettan barnsburð, hava rætt til 8 vikur afturat samlaða tíðarskeiði hjá foreldrunum. Vikurnar skulu takast innan 52 vikur eftir barnsburð.

Vikurnar hjá foreldrunum kunna ikki nýtast samstundis.

Pápar hava rætt til barsilspening í 4 vikur frá barnsburð og til 44/48/52 vikur eftir barnsburð.

Er man einlig/ur hevur man rætt til allar vikurnar.

Eftir hesar vikur, hava foreldur ein lógartryggjaðan rætt til, at vera heima hjá barninum í 52 vikur eftir barnsburð. Tó rindar Barsilskipanin ikki barsilspening eftir viku 44/48/52 eftir føðing.

**Ættleiðing**
Foreldur hava rætt til barsilspening samstundis í upp til 4 vikur áðrenn móttøku.
Treytin fyri barsilspening hettar tíðarskeiði er, at viðkomandi er staddur uttanlands eftir barninum.

Eftir móttøku av barninum hava foreldrini rætt til barsilspening í tilsamans 48 vikur. Av teimum 48 vikunum kunnu foreldrini fáa barsilspening samstundis í 4 vikur.

Eftir hesar vikur, hava foreldur ein lógartryggjaðan rætt til, at vera heima hjá barninum í 56 vikur eftir barnsburð. Tó rindar Barsilskipanin ikki barsilspening eftir viku 48 eftir móttøku.

**Innlating**
Umsókn um barsilspening skal latast Barsilsskipanini **innan 6 mánaðir** eftir barnsburð ella í sambandi við ættleiðing, eftir at barni er móttikið. Er umsóknin ikki latin inn innan hesa freist, fellur rætturin til barsilspening burtur.

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
Fax 35 26 01
taks@taks.fo
www.taks.fo